


*Hjalgrím Elttør er sannur fongur hjá B36 í ár, og verður hann uttan iva eisini ein stór hóttan ímóti hoyvíkingum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# B36 skal víðari

**LØGMANSSTEYPIÐ** FC Hoyvík hevur eitt gott lið, men sunnudagin mugu teir vera tveir, møguliga tríggjar leikara fyri uttan og tað kann kosta teimum dýrt ímóti topptrimmaða B36

Rólant Waag Dam

FC Hoyvík vantar bæði Mortan Joensen og Janus Mortensen til fjórðingsfinaludystin móti B36 sunnudagin. Haraftrat er tað ógvuliga ivasamt, hvussu verður við Jørgen Meitilberg.

Samstundis hevur liðið heldur ikki fingið nakra ynskibyrjan upp á landskappingina, við einum stigi eftir tríggjar dystir.

Tí er ein sigur av sannførandi slagi, einasta nøktandi úrslitið hjá B36 sunnudagin. Hetta hóast menn sum Bergur Midjord, Heini í Skorini og Herbert í Lon Jacobsen eru skaddir, umframt at tað er ógreitt hvussu verður við Fróða Clementsen og Høgni Eysturoy.

B36 er nummar eitt í landskappingini og B36 er nógv tað betra liðið. Sunnudagin skal tað prógvast við, at B36 spælir seg víðari til hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið – tað er so einfalt sum tað.

*rolant@sosialurin.fo*

# Elsta og yngsta felagsliðið í eldin

**LØGMANSSTEYPIÐ** EB/Streymur hevur ment seg til eitt sterkt steypakappingarlið, men FC Suðuroy vísti mikukvøldið, at teir eisini meina sína luttøku í hesi kapping í fullum álvara

Rólant Waag Dam

FC Suðuroy vann mikukvøldið 6-1 á Skála og spældi seg harvið víðari í steypakappingini. At vinna 6-1 er at vísa format, men tá mótstøðuliðið var Skála, sum spælir í triðbestu deildini, so skal hesin stórsigur takast við einum ávísum fyrivarni.

Hinvegin ber ikki til at taka frá FC Suðuroy, at teir nú hava vunnið tveir dystir á rað. Fyrst á B68 farna vikuskiftið og mikukvøldið á Skála. Hesar báðar dystirnar hevur liðið skorað níggju mál og mikukvøldið vóru málskjúttarnir ikki færri enn seks í talið. Teirra millum Obi Charles, sum eisini gjørdi tvey mál móti B68, og er ein vandamikil harri.



*Nigerianski Obi Charles hevur sanniliga víst seg sum ein farligan harra*

Hyggja vit at hinum restina av landskappingardystunum, FC Suðuroy hevur spælt í ár, so hevur liðið eisini fingið javnleik í móti bæði HB og NSÍ. Tað er flott av uppflytarunum, sum í roynd og veru einans hava tapt ein landskappingardyst av fýra.

Dystin, teir taptu var í móti júst EB/Streymi fyri tveimum vikum síðani. Hesin dystur var við Margáir í Streymnesi og heimaliðið vann 2-0. Til henda dystin hevði EB/Streymur nógvar mans skaddar. Men Marni Djurhuus varð flogin heim úr Danmark og her á blaðnum skrivaðu vit tá, at Marni var munurin. Marni Djurhuus var ikki við teir báðar fyrstu landskappingardystirnar hjá EB/Streymi, sum teir taptu og spældu javnt, og hann var heldur ikki við seinasta umfar, tá tað gjørdist til javnleik í Gøtu.

Sunnudagin verður Marni Djurhuus við aftur. Um tað fer at føra til sigurs er ilt at siga, men ein stór hjálp er tað undir øllum umstøðum at fáa hann aftur, tá bæði Daniel Udsen og Brian Olsen framvegis eru skaddir, umframt at Alex José dos Santos er leikbannaður.

Hjá FC Suðuroy er bara Mustapha úti, annars hava teir allar mans tøkar.

*rolant@sosialurin.fo*

# Víkingur er stórfavorittur

**LØGMANSSTEYPIÐ** Eingin ivi er um, at Víkingur er stórfavorittur í dystinum móti AB. Víkingur er sitandi steypavinnari og nummar tvey í landskappingini, meðan AB ikki hevur vunnið ein landskappingardyst í ár



Rólant Waag Dam

Steypavinnararnir úr Víkingi hava heimavøll, tá AB vitjar í fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið sunnudagin. Alt talar fyri, at Víkingur vinnur henda dystin.

Ikki einas eru teir sitandi steypavinnarar og nummar tvey í landskappingini. Seinast liðini møttust, vann Víkingur eisini málríka dystin 5-3. Harumframt vann Víkingur eisini hvønn einasta dyst, liðini spældu í fjør við einum máli móti ongum. Við øðrum orðum hevur AB enn ikki fingið stig burtur úr einum dysti við Víking, síðani teir fluttu upp í Vodafonedeildina.

Sunnudagin verður ikki spælt um stig, men um víðari luttøku í steypakappingini. Um landskappingarstigatalvan kann brúkast til nakað í hesum sambandið, er truplult at meta um. Men hon sigur í øllum førum nakað um gongdina hjá liðunum báðum.

Víkingur er nummar tvey við at vinna á AB og NSÍ og spæla javnt í móti HB og EB/Streymi.

AB liggur hinvegin triðaftast og hevur ikki vunnið nakran dyst enn. Saman við B71 eru teir tað liðið, sum hevur latið flest mál ígjøgnum, nevniliga 12. Hinvegin er tað bara HB, sum hevur skorað fleiri mál enn AB. Eins og Víkingur hevur AB skotið níggju mál, fimm av teimum eigur toppskjúttin í Vodafonedeildini Stig-Roar Søbstad.